## EG MEINI TAÐ

# Kappróður, politikkur og fjórða statsmaktin



*Niels Uni Dami skrivar*

Eg var um at kvalast í drekkamunninum mánakvøldið í síðstu viku. Eg hevði kókað vatnið, bryggjað eina kannu av te, og sett meg væl til rættis at hyggja eftir Degi og Viku. Eg helt alt standa væl til; flokkurin, sum eg helt við, stóð sterkt í veljarakanningini, sum Fregnir júst høvdu gjørt, og valið skuldi vera dagin eftir.

Fyrst umrøddi SVF veljararkanningina í Fregnum, hetta uttan at nakar politikari slapp framat skíggjanum, júst sum siður er kvøldið áðrenn val. Síðani settu sjónvarpstøkningarnir yvir til Katrina Petersen. Hon var stødd í Vestmanna, fullkomiliga live, á staðnum via satelitt og jeg skal gi' dig. Katrin greiddi frá, at kappróðrarbátarnir vóru farnir at venja aftur, og at í Vestmanna høvdu tey fingið eitt nýtt kappróðrarneyst.

Longu tá byrjaði eg at seta drekkamunnin so smátt í hálsin, eg visti væl, at størsta valagnið hjá sambandsflokkinum í Norðurstreymoy var, at høvuðskandidaturin Bárður Nielsen hevði staðið fyri at gera nýtt kappróðrarneyst í Vestmanna. Hendan umtala av hansara verkætlan tyktist nokkso ódámlig dagin fyri valið.

Eg sat longu tá og hugsaði, um tað mundi vera onkur í sambandsflokkinum, sum hevði lokkað Katrina til Vestmannar, ella um tað var onkur av hinum sum ruku fyri Bárður.

Men eg var ikki skelkaður, Katrin kundi jú ikki vita, at hetta var valagn hjá sambandsflokkinum. Hon visti ikki, at Bárður Nielsen hevði nakað við kappróðrarneystið at gera.

Valstríðið hjá andstøðuni hevði verið stak ódámligt, og hetta var tí ikki annað enn enn eitt ódámligt og ófantaligt innslag.

Eg harkaði eitt sindur, bannaði eftir sambandsflokkinum og fekk mær uppí munnin av heita drekkanum, men tað skuldi eg ongantíð havt gjørt - tí í somu løtu trein Bárður Nielsen fram á skíggjan - Bárður Nielsen toppkandidatur í einum tí tættasta valøkinum í landinum Norðurstreymoy - Bárður Nielsen ungt stjørnuskot í sambandsflokkinum dagin áðrenn valið, í einari langari reklamusending goldin av mínum sjónvarpsgjaldi.

Eg hostaði og harkaði og fekk at enda drekkamunnin uppá pláss. Fyrst gjørdist eg illur, men sissaðist skjótt aftur, onkur góð frágreiðing mátti vera.

Men eingin frágreiðing, tyktist nøktandi, innslagið var í sær sjálvum ikki serliga aktuelt, tað kundi líka so væl havt verðið sent nakrar dagar seinni. Innslagið gav stutt og gott einum valevni eyka stig dagin fyri valið, har er eingin frágreiðing, sum kann rættvísgera slíkt. Heldur ikki tann at SVF høvdu leigað ein bil fyri 100.000 kr. og ongantíð brúkt hann, tað eru nógv onnur live-innsløg sum kunnu gerast, sum einki hava við valið at gera.

So eftir at hava hugsað um hetta gjørdist eg aftur illur, og hugsaði at næstu ferð eg møtti einum sjónvarpsfólki so fekk hesin skeld. Hetta hendi dagin eftir, eitt neyðars sjónvarpsfólk royndi at verja seg við, at SVF metti, at hetta var eitt ítróttarinnslag og at tað tí varð mett, at tað ikki var reklama fyri Bárð.

Sovorðið møsn, eg veit um trøllvaksin fólk sum hava atkvøtt fyri Bárði bara orsakað av kappróðrarneystinum, so SVF skuldi skammað seg.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Móttøka

Inni á elektroniska kalendaranum stendur gandaorðið og blunkar. Gott at verða mintur á eitt so álvarsligt mál. So snildisliga er skipað fyri, at kalendarin aftur og aftur sigur "Minst til móttøku í dag"

**HUGLEIÐINGAR**
*Ása undir Kletti*



Hetta dragandi, lokkandi gandakenda orðið, sum sæst í bløðunum við jøvnum millumbilum. Hetta orðið, sum knappliga fær so ómetaliga stóran týdning.

"Móttøka verður millum 15.00 og 17.00 fyri samstarvsfeløgum, viðskiftafólki, vinum og øðrum". Inni á elektroniska kalendaranum stendur gandaorðið og blunkar. Gott at verða mintur á eitt so álvarsligt mál. So snildisliga er skipað fyri, at kalendarin aftur og aftur sigur "Minst til móttøku í dag". Snilt, Snilt. Dugi ikki at ímynda mær, at bíðað verður so leingi, so kalendarin av sínum eintingum skiftir boðskap: "Tú mundi gloymt móttøkuna". Ikki, tá tað snýr seg um gandaorðið. Hugsi eina løtu um, hvørji tey eru, sum koma undir hesa so vælsignaðu kategori og so trúliga møta, tá kalendarin kallar.

Besti Armani ella Boss klædningurin verður kekkaður kvøldið fyri. Hondseymaðu Gucci skógvarnir verða pussaðir, og skjúrtan er nýstrokin og so broyskin sum eitt nýbakað rundstykki frá Frants, so har er eingin trupulleiki. Slipsið verður valt við nógvum umhugsni - fleiri verða tikin fram og løgd á bringuna, áðrenn tað sera týðandi slipsastigið verður tikið. Jú, tað bleiv tað gull/bláa ríputa silkislipsið frá Cardin hesaferð. Umráðandi er ikki at møta í sama slipsi sum til seinastu móttøku. Og ikki at gloyma Calvin Klein boksarashortsini. Jú, tey eru eisini nýstrokin! Alt er sum tað eigur at vera.

Stóð og eygleiddi eitt slíkt tiltak nú ein dagin. Átti kanska at verið farin inn sjálv - eg var eisini eitt slag av samstarvsfelaga, og mín sann, um eg ikki eisini var fyrrverandi granni og skyldfólk hjá ánaranum. Kriteriini vóru so avgjørt í lagi, men hinvegin, so helt eg ikki, at mínir sóljugulu Viking gummistivlar (teir til gott) og fjøsuta, dálkaða joggingsettið, eg var í henda fríggjadagin, hevði ordiliga gjørt seg millum allar hasar øgiliga fínu og hugfarsligu garparnar, sum tyrptust heilt út í tún. Nei, nei. Tað fór aldri at ganga.

Grundaði eisini djúpt um, hvar konurnar og børnini hjá øllum hesum álvarsligu, skundmiklu yvirfrakkakløddu monnunum vóru. Kom heilt skjótt til eina logiska niðurstøðu. Tær vóru sjálvandi í SMS, eftir at tær høvdu heintað tey smáu í vøggustovum/barnagørðum/skúlum! Fríggjadagur var, (hvussu ber tað til, at móttøkur altíð eru fríggjadagar?) og hvat var meira praktiskt, enn at gera alt um eina leið? Konan fór til handils at gera tað heilt stóra fríggjadagsinnkeypið við børnunum, og garpurin, ja, hann fór til móttøku.

Ein lítlan tíma aftaná hava tey hitst aftur á parkeringsøkinum. At øll hillin við Smarties fór út eftir gólvinum, og at dreingirnir skutu til máls við víndrúum, so eitt heilt víndrúutyssi endaði á høvdinum á einari eldri konu, og at tann 5 ára gamla dótturin ikki vildi sleppa einari eskju við MARS og til seinast setti seg á eskjuna, tað eru jú bara slíkt, ið kann henda, tá ein er til handils. Einki at tosa um. Tað hendir alla tíðina. Á ja. Í næstu viku er kanska aftur ein móttøka. Livst so spyrst. Vit síggast! (Til móttøku).

*Framhald av forsíðuni*

eftir manga góða roynd at hjálpa tí ávegis. Bæði eitt og annað er roynt. Og tað lítla hvíta lambið í túninum, sum stetlar úr kassanum og aftur í kassan, tað hevur sum hús, er nú tað síðsta og einasta, av sínum systkinaflokki.

Men tó er tað sjáldsamt, at hava havt tvær ær, við trimum lombum hvør. Ein onnur hevði tvey lomb. Ein tvílemba, ella tvølba, sum sagt verður í Suðuroynni. Sostatt var talan um tríggjar ær og átta lomb.

### Stressa av

Og tað er greitt, at her er nakað, sum upptekur Ingeborg og familjuna. Hetta er ein heilt annar pallur, annar leiklutur, enn fólk flest kenna hana í.

Her er tað ikki fakfelagsleiðarin. Her er tað ein kvinna, ið tekur sær av dunnum, gæs og lombum. Lombum, ið veruliga hava brúk fyri kønum hondum. Og Ingeborg og Andru greiða frá. Og greitt er, at tey vita hvat tey tosa um og fáast við.

Lítla hvíta lambið, sum stetlar í túninum er alskið, nú tað er við at koma fyri seg. Og svarta heimalambið heldur seg ikki aftur.

Handan netið gongur dunnan væl nøgd við sínum mongu ungum. Hon hevur goymt teir so væl undir vøkstri av grasi og bløðum, so vónleyst er at telja teir.

Her er lív og gróður. Longur uppi, nakað oman fyri húsini, gongur hin ærin, ið hevur trý lomb, ið klára seg væl.

Nakað longur niðri gongur hin, sum hevur mist tvey. Hon jarmar, og hvíta lambið svarar so spakligt. Men fara til mammuna kann tað ikki, tí hon er ikki før fyri at taka sær av tí.

### Annar leiklutur

Sólin skínur, lív er í garðinum og úti á vegnum steðga fólk at forvitnast og fregnast. Prátið gongur.

Og øll fegnast um, at í hvussu er eitt lamb er eftir, tá tað nú einaferð var so óheppið, at øll trý hjá einu ærini ikki komu fyri seg.

Jú, her hava tey tikið orðini til sín. Ein skal fáast við okkurt heilt annað. Hava ítriv. Okkurt, ið ein tímur at fáast við.

Tá stressar ein av!

Tíð er at takka fyri seg, takka fyri prátið. Og hóast ikki heilt einki varð prátað um politikk og verkfall, so var tað lembingin og djóralívið, landbúnaðurin, ið átti hesa løtuna.

Hesa løtuna, har leiktjaldið ikki var tað, sum flest øll kenna, tá talan er um Ingeborg Vinther. Leiktjaldið var ikki Hotel Hafnia, ikki verkfallsfórðingar og verkfallsvaktir. Ikki ein fakfelagsformaður, ið verjir sjónarmið hjá teimum tímaløntu.

Her var leiklutirn ein annar. At verja og hjálpa, nú lembingin er í hæddini, og so mangir vandar lúra hjá teim fýrbeintu, ið síggja dagsins ljós fyri fyrstu ferð.



# Havi eyga fyri góðari list

- Tað var eitt nú Nonnegaard, sum gjørdi, at eg fekk áhuga fyri list. Hann hevði sum fáur skil fyri góðari list. Eg ivist í, um føroysk list hevði verið á so høgum støði, um Nonnegaard ikki var komin til Føroyar og fór undir at keypa føroysk list. Kona mín var hollur ráðgevi, eisini hon hevði eyga fyri góðari list, sigur Sofus Olsen, listasavnari

**LISTASAVNARI**
*Turið Kjølbro*

Í tronganum niðarlaga á Tinghúsvegnum í Havn standa eini fittlig reyð hús við urtagarði. Uttanifrá hevur tú ikki varhugan av, at her býr ein av teim stóru listasavnarunum í Føroyum. Men tú ert ikki komin longur enn inn í durin, tá ið listarverk eftir okkara elstu og størstu listafólk møta tær. Vit hava heitt á Sofus Olsen um at greiða okkum frá sínum stóra áhuga fyri føroyskari list.

- Hvat tað er, sum mær dámar, dugi eg illa at greiða frá. Heldur vil eg siga, at eg havi eyga fyri góðari list, sigur Sofus Olsen, sum er útbúgvin cand. polit. og sum í nógv ár arbeiddi í Føroya Banka í Havn sum grannskoðari.

Frá miðskeiðis í sekstiárunum og í eini tjúgu ár sat Sofus Olsen í nevndini í Listafelagnum. Hesi árini var hann við til at keypa fleiri av málningunum, sum í dag prýða Listaskálan. Av sínum eintingum hevur hann eisini skipað fyri listaframsýningum uttanlands við føroyskari list. Tann fyrsta í 1971, tá ið listarverk eftir Jack Kampmann, Ingálv av Reyni, William Heinesen, Zacharis Heinesen, Steffan Danielsen, Hans Hansen, Poul Horsdal og Elinborg Lützen fóru til fleiri býir í Skotlandi, Ornoyggjarnar og Hetlands.

### Teir tríggir stóru

Fyrsta málningin keypti Sofus Olsen fyrst í sekstiárunum á framsýning í kommunuskúlanum í Havn. Ein málning av eini ungari kvinnu, sum Ingálvur av Reyni hevur málað í 1961. Síðani hevur hann keypt rættiliga nógvar málningar eftir Ingálv, málningar frá teim fyrstu árunum, Ingálvur málaði, men eisini nógvir nýggjari málningar eru í savninum. Eisini eigur hann nógvar tekningar eftir Ingálv. Hóast Sofus Olsen treyðugt vil siga okkum, hvør fremsti føroyski listamálarin er eftir hansara tykki, er skilligt, at Ingálvur er millum teirra.

- Mær dámar Ingálv bæði sum menniskja og sum málara. Hann er eitt fantastista gott menniskja, sum eg hitti av og á. Nakrir fáir listamenn í Havn og ein í Kirkjubø eru millum teirra, mær dámar best í dag. Um vit nakrantíð fáa so stórar listamenn innan myndlistina aftur sum Mikines, Ingálv av Reyni og Janus Kamban, fer tíðin at vísa, sigur Sofus Olsen.

Fleiri málningar og vatnlitsmyndir hjá Mikines eru í stovunum hjá Sofusi. Onkran teirra hevur hann keypt úr deyðsbúgvi í Danmark fyri nógvum árum síðani. Tann fyrsta málningin av Mikines, sum Sofus Olsen ognaði sær, keypti hann miðskeiðis í sekstiárunum. Hann hevði hoyrt um málningin og at viðkomandi, ið átti hann, ikki vildi hava hann hangandi heima við hús, tí myndaevnið var so myrkt og dapurt. Jú, tað var gaman í at keypa málningin, og inni í einu stovuni hongur hesin stóri málningurin. Av einum líkfylgi, sum fer niðan eina høvd.

Ein tann vakrasta kvinnumyndin er eitt tað fyrsta, ið møtir tær í stóru stovuni. Hana hevur Jack Kampmann málað seint í fimtiárunum av konu sínu í heitum litum. Í gongini stendur lítið bronsuhøvd av gentubarni, sum Fritjof Joensen hevur gjørt seint í sekstiárunum. Á vegginum hongur skurðmynd av árabáti, sum Janus Kamban hevur gjørt, og inni í stovuni eru nógvar tekningar og ein standmynd eftir Janus. Ein skitsumynd, sum Ruth Smith hevur gjørt, eigur Sofus Olsen eisini, vatnlitsmynd av Williami Heinesen umframt málningar av Poul Horsdal, Steffan Danielsen, Bent Restorff, Hans Hansen, Zacharias Heinesen, Gunnar Nicolajsen, Frimod Joensen og tekning eftir Hans Jákup Glerfoss.

Alskurin er serliga til føroyska list, men treyðugt so, eru navnframir danskir listamenn ímillum, eitt nú John Olsen og Palle From, og einstøk listarverk, málað av listafólki í Ornoyggjunum.

Nútíðarlist er minsti parturin í savninum hjá Sofusi Olsen. Einstakir eru kortini, eitt nú steinprent eftir Marius Olsen og Tórbjørn Olsen, og vatnlitsmyndir eftir Amariel Norðoy, Trónd Patursson og aðrar.



*- Nonnegaard keypti meiri enn nakar annar føroyska list og hann gjørdi, at aðrir stovnar eisini fóru at keypa. Frá at lata kongligt danskt porsilen sum gávulutir, læt bankin bara føroysk listarverk sum gávu til ymisk høvi, og tað var siðvenja, líka til kreppan kom, sigur Sofus Olsen*

*Mynd: Finnur Justinussen*

### Vánalig arbeiðskor

Frægasta myndlistin í Føroyum er í Havn og Kirkjubø. Tað, sum kemur aðra staðni frá, hevur ikki eins listarligt virði, heldur Sofus Olsen.

- Og her eru Listaskálin og Norðurlandahúsið. Eg fari á allar listaframsýningar, kortini sjáldan á tær, sum eru í Smiðjuni í Lítluvík. Har eru helst amatørar, og støðið á teimum framsýningunum er sum oftast lágt. Hinvegin er eingin grund hjá mær at keypa fleiri málningar, tá eg ikki havi pláss fyri teimum, hóast tað eru fleiri eg kundi hugsað mær.

Spurdur, hvat hann heldur um umstøðurnar hjá skapandi listafólki, sigur Sofus Olsen, at hølisviðurskifini hjá teimum eru út av lagi vánalig.

- Listafólkini, sum halda til í miðbýnum í Havn til dømis, vita ikki, nær tey verða blakað út. Hetta eru millum frægastu listafólk, vit eiga í dag. Tórshavnar býráð átti at hjálpt teimum til sømilig arbeiðskor, skapt nøktandi karmar ella bygt atelier, sum listafólkini kundu leigað fyri bíligan penga, sigur Sofus Olsen, sum kortini ikki hevur vónir um, at tey, ið sita í býráðnum í løtuni, fara at gera nakað munagott fyri listina.

- Havnar kommuna sýgur skatt úr øllum Føroyum, og átti tí at tikið sær betur av listafólkunum, sum her eru. Myndlistin er tann mest týðandi listagreinin, sum meiri enn nøkur onnur setir høvuðsstaðnum á heimskortið. Í sjálvum sær átti tað at verið ein grund til at stuðlað myndlistini betur.

Starvslønir til listafólk kunnu gerast ein koddi, heldur Sofus Olsen.

- Eingin sigur, at starvslønir føra til betri list. Tær kunnu líka so væl føra til kvantitet heldur enn kvalitet. Sjálvsagt ynskja listafólk sær pengar, tað er menniskjansligt. Upp ímóti 150 bøkur og rit koma út á hvørjum ári, og alt verður stuðlað við almennum pengum. Tveir trið-

*Framhald á síðu 5*